## Týsk sensatión

Týskur fótbóltur fekk eina rætta sensatión um vikuskiftið, tá ið Hertha Berlin vann heili 5-1 á útivølli ímóti týsku meistarunum Wolfsburg. Kappingarárið hjá Hertha Berlin hevur annars verið vánaligt, men hetta vikuskiftið bar alt til. Theofanis Gekas skoraði hattrick í dystinum, og sigurin bøtir um møguleikarnar hjá Herha Berlin at sleppa undan niðurflyting úr fyrstu Bundesliguni.



## Kann taka Giggs

Ryan Giggs hevur sett nógv met í síni tíð sum Manchester United spælari, og skal ein spælari taka hansara met, má tað verða Wayne Rooney. Tað heldur Giggs sjálvur. – Um Wayne spælir her næstu 10 árini og ikki fær álvarsligar skaðar, fer hann at seta øll hugsandi met. Hann fer at spæla fleiri dystir enn eg og skora fleiri mál enn Bobby Charlton. Eg vóni, at hann fer at megna tað, sigur Giggs við Mail On Sunday.

## Løgnasti dystur nakrantíð

**Brian Kerr, landsliðsvenjari, heldur dystin í gjár vera løgnasti dystur, hann hevur verið við til. – Bólturin fór uppundir loftið seks ferðir. Eg hevði heldur viljað spælt uttandura, sigur hann**



Eirikur í Jákupsstovu

Hóast hetta var fyrsti landsdysturin hjá Føroyum síðan oktober mánað, so var tað ikki sjálvt fótbóltsspælið, sum er tað fyrsta Brian Kerr nevnir, tá hann verður spurdur um dystin. – Hetta var løgnasti fótbóltsdystur eg havi verið við til. Bólturin fór upp undir loftið seks ferðir í dystinum. Tað er ikki sum ein ordiligur dystur. Tað er ikki sum ein ordiligur landsdystur. Eg hevði nógv heldur viljað spælt uttandura, sigur Brian Kerr.

Hann heldur somuleiðis, at sjálvt landsliðið hevur havt alt ov stórar trupulleikar. – Vit hava havt ov nógvar trupulleikar av veðrinum í Føroyum. Spælararnir hava næstan ikki spælt í januar og februar, og so brádliga í mars hava teir nógva venjing og nógvar dystir. Fyrireikingarnar hava ikki verið í lagið. Tað er bara ørt í veruleikan, sigur Brian Kerr.

Hann leggur afturat, at mentaliteturin má broytast, um fólk vænta góð úrslit av landsliðnum.

– Vit hava leikarar, sum spældu hósdagin og leikarar, sum spældu fríggjadagin. Tað vísir manglandi respekt fyri landsliðnum. Men burtursæð frá tí var spælið hjá okkum í lagið, sigur Brian Kerr.

### Teir nýggju vóru góðir

Hetta er fyrsta ferðin, at Brian Kerr stendur á odda fyri landsliðnum í einum venjingardysti, og tað fegnast hann hóast alt um.

– Vit høvdu nógv gott spæl, og tá vit hugsa um, at tað vóru nógvir nýggir leikarar. Spælararnir spældu væl, men fyrsta ferðin teir nerta við bóltin er ikki heilt nóg gott, hóast teir flestu annars orka at spæla. Men teir nýggju gjørdu tað gott. Rógvi Poulsen spældi væl, Vagnur Mohr Mortensen er endiliga við, og hann spældi eisini væl, og Jóan Símun Edmunsson spældi eisini væl, sigur Brian Kerr.

Hann fegnast somuleiðis, at hann slapp at síggja Christian Mouritsen og Høgna Zachariasen á landsliðnum.

# Íslendingar he

**Føroyar høvdu bóltin nógv, tá vit hittu íslendingar í høllini í Kópavági í árliga landsdystinum. Men íslendingar fingu hevnt ósigurin frá í fjør, og ósigurin kundi væl verið bæði størri og minni enn 2-0**



Eirikur í Jákupsstovu



Tað vóru fá, sum væntaðu nakað serligt av venjingardystinum millum Føroyar og Ísland í Kópavági í gjár. Heili fýra leikarar góvu avboð til landsliðið, áðrenn tað fór avstað, og kavin í Føroyum seinastu tíðina hevur eisini avmarkað fyrireikingarnar til hendan dystin, sum føroyingar hóast alt vunnu í fjør, tá tað var órógv í hópinum, og Heðin Askham brádliga var a-landsliðsvenjari eina løtu.

Sjálvt ikki miðlarnir fingu mannað seg upp at gera nakað serligt burtur úr dystinum, og venjarin, Brian Kerr, legði longu fríggjadagin eftir føroysku feløgunum, sum brúktu landsliðsleikarar í venjingardystum bæði hósdagin og fríggjadagin.

Úrslitið gjørdist eitt – mann freistast at siga – vanligt 2-0 tap, so har var heldur onki, sum kom óvart á.

### Byrjaðu væl

Men um tað var eldgosið í Íslandi sunnumorgunin, sum órógvaði íslendsku leikararnar meira enn teir føroysku, skal vera ósagt, men fyrstu løtuna vóru føroyingar omaná í høllini. Longu áðrenn tíggju minuttir vóru leiktir, høvdu føroyingar tríggjar ferðir spælt seg inn um íslendsku verjuna, og hóast seinasta avleveringin ikki ordiliga sat, so vísti hetta, at føroyingar vildu okkurt.

Men íslendingar vóru veruliga órógvaðir í meira enn tíggju minuttir, tí tá kom Ísland til ein møguleika, sum onkur vildi kallað hepnan, men hvussu er og ikki, so megnaði Matthías Vilhjálmsson at skalla bóltin upp í høgra málhorn, uttan at Gunnar Nielsen – sum eisini vardi málið fyri júst einum ári síðan – hevði nakran møguleika.

Spælið javnaði seg út gjøgnum hálvleikin, og kanska hevði føroyska liðið bóltin meira, enn tað plagar at hava í sínum dystum. Hetta hevði millum annað við sær, at føroyingar fingu fleiri hornaspørk, men føroyingarnir fingu ongantíð ordiliga hótt íslendska málið.

Áðrenn føroyingar vardu, vóru íslendingarnir aftur upp á spæl. Tí í 37. minutti gjørdist støðan 2-0 til Ísland, tá Kolbeinn Sigþórsson fær bóltin úr høgru síðu og skorar úr stuttari frástøðu.

Føroyingar hildu á fram at royna at spæla bólt, men teir veruligu møguleikarnir komu ongantíð. Kanska eisini orsakað av, at Súni Olsen sat á bonkinum.

### Dysturin varð upplatin

Longu frá byrjan í seinna hálvleiki byrjaðu útskiftingar, sum ofta oyðileggja ein venjingardyst at vera gjørdar.

Hetta merkti tó ikki, at færri møguleikar komu í dystinum. Tá liðini byrjaðu at skifta út, vísti tað seg nevniliga, at bæði liðini royndu meira fram eftir vøllinum, og hetta lat upp í báðum endum.

Íslendingar skutu nakrar ferðir á føroyska málið, og føroyingar skutu nakrar ferðir við síðurnar av íslendska málinum.

Størsti møguleikin hjá Føroyum kom helst í 68. minutti, tá fyrrverandi spælarin hjá Keflavík, Símun Samuelsen, enntá kom fram við íslendska málverjanum, áðrenn hann setti bóltin í síðunetið. So tað var ikki tað, at føroyingar vóru púra spældir av vøllinum.